# Trygdarviðurskiftini skulu betrast

**Trygdarviðurskiftini hjá teimum, sum arbeiða við brennistøðina á Hjalla, hava ikki verið nóg góð. Hetta veður nú bøtt uppá, sigur álitismaðurin**

ARBEIÐARATRYGD
*Edvard Joensen*



Trygdarviðurskiftini bjá arbeiðsfólkinum á brennistøðini á Hjalla hava ikki verið nóg góð. Men hetta skal nú betrast, sigur Jóan Carl Dam, sum er álitismaður og trygdarumboð hjá arbeiðsmonnunum á staðnum. Stjórin hevur játtað at lata menninar læknakanna, sigur álitismaðurin.

Arbeiðsumstøðurnar hava milt sagt verið vánaligar á økinum kring brennistøðina á Hjalla, sigur Jóan Carl Dam.

*Trygdarviðurskiftini kring brennistøðina á Hjalla hava ikki verið nóg góð. Men nú verður bøtt um tað, sigur álitismaðurin, Jóan Carl Dam*

Menninir hava arbeitt í øllum slags ruski og avfalli, og einki skil hevur veirð hildið á, hvat er savnað saman við hvørjum.

– Í grundini er tað at undrast á, at eingin rættilig vanlukka er hend, sigur hann.

Tá hann tosar um vanlukku, roknar hann eisini tað sum vanlukku, sum rakar menninar spakuliga. Tí um tú gerast avlamin av at fáa ein vegg oman yvir teg upp á nøkur sekund, ella av at anda málingalukt og annað eitur niður í teg í fleiri ár, kann gera tað sama. Úrslitið líkist.

Og hetta er júst eitt av tí, Jóan Carl Dam sum álitismaður er farin at gera nakað við nú, sigur hann.

Hann vil í fyrsta lagi hava allar menninar læknakannaðar, soleiðis at heilsustøðan kann staðfestast nú beinanveg. Síðan skulu teir aftur til uppfylgjandi kanningar fyri at síggja, um nøkur broyting er, sum kann vísast aftur til arbeiðið. Og eingin má setast í starv í framtíðini, uttan at hann hevur slíka læknaváttan við sær, sigur Jóan Carl Dam.

Hann sigur, at leiðslan fyri brennistøðini er positivt stillað til hesi uppskot hansara.

Hetta er nú ikki nakað nýtt mál soleiðis, sigur hann, men nú heldur hann, at tíð er upp á at fáa tað avgreitt einaferð fyri allar.

Eitt annað mál er so, at økið hevur ikki verið og væl vart móti fólki uttaneftir, vísir Jóan Carl Dam á. Fólk kann koma og fara, sum teimum lystir. Taka lutir av gomlum bilum til dømis, ella leita í einihvørji bingju eftir líkum og ólíkum.

– Eg havi bara bíðað eftir tí degi, tá neyðugt verður at fara at leita efir onkrum persóni, sum er burturblivin undir onkrum niðurdotnum bilvraki í rúgvuni her uppi, sigur Jóan Carl.

Hann vil hava, at nógv strangari reglur og avmarkingar verða gjørdar fyri økið.

# Sóttreinsivirkið reist



*Virkisbygningurin hjá Salmon Proteins á Eiði varð reistur í gjár*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Virkið, sum Salmon Proteins byggir á Eiði til millum annað at taka í móti og sóttreinsa sjúkt slógv frá alivinnuni, varð reist í gjár**

UMHVØRVI
*Edvard Joensen*

**Eiði:** Arbeiðið gongur eftir ætlan, og higartil hevur tíðarfreistin hildið, sigur Jógvan Emil Nielsen, stjóri á Salmon Proteins. Tað er byggifelagið Articon/Byggi Service, sum stendur fyri arbeiðinum.

Jógvan Emil Nielsen, sigur, at tey fara bara at taka í móti slógvi frá alivinnuni á virkinum.

Alivirkini framleiða ensilagu úr slógnum, og hon er løtt at flyta til virkið. Avtala er gjørd við lastbilfyritøkuna Hans Egil Joensen & synir á Eiði um flutning av allari ensilagu til virkið.

Tað hevur ikki verið upp á tal at taka slógv frá vanligu flakavirkjunum, sum arbeiða hvítan fisk, sigur Jógvan Emil Nielsen. Slógv frá hvítum og reyðum fiski má ikki blandast sman. Tað er stutt og greitt ikki loyvt, sigur hann.

Virkið skal eftir ætlan standa klárt at taka í brúk í juli, og arbeitt verður við at fáa sáttmalar um sølu av framleiðsluni.

– Eingin endalig avtala er gjørd enn, men fleiri seriøst áhugaðir útlendskir keyparar eru inni í myndini, sigur stjórin á Salmon Proteins.

# Fyri formansins rokning

**Almannamálaráðið hevur ikki samskift við Borgina um almennan stuðul til pensiónistar, sigur fulltrúi á Almannamálaráðnum**

ÓSEMJA
*Edvard Joensen*

Almannamálaráðið og Eldrafelagið Borgin hava einki samskifti havt, sigur fulltrúi á Almannamálaráðnum.

Í blaðnum í gjár segði formaðurin i Landsfelag Pensiónistanna, at Eldrafelagið Borgin hevði fingið at vita frá Almannamálaráðnum, at felagið skal lata roknskap inn til Landsfelagið.

– Tað má standa fyri hansara egnu rokning, sigur Kristian Árnason, fulltrúi á Álmannamálaráðnum.

– Eldrafelagið Borgin hevur skrivað til Almannamálaráðið um hetta mál. Hetta skrivið er dagfest 3. februar 2003, men felagið hevur ikki fingið svar frá okkum enn. Orsøkin er tann, at eg í sambandi við málsviðgerðina munnliga havi biðið um at fáa viðtøkurnar fyri Landsfelag Pensjónistanna, áðrenn málið verður nærri viðgjørt í Almannamálaráðnum. Hesar fyriliggja ikki í løtuni, sigur hann.

Sostatt vísir hann aftur, at Almannamálaráðið hevur noktað Borgini stuðul við væntandi roknskapi sum grundgeving.

# Kvinnulig mentan í Miðvági

**Kvinnur í Vágum skipa fyri mentanarkvøldi altjóða kvinnudagin , sum er í dag. Kvøldsetan verður í bygdarskúlanum i Miðvági klokkan 20.00**

KVINUDAGUR
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Kvøldseta við sangi, upplestri, fyrilestri og listaframsýning verður í Bygdarskúlanum í Miðvági klokkan átta í kvøld.

Skráin, sum løgd er fyri kvøldsetuna roknast við at fara at vara einar tveir tímar, siga tær, sum reika fyri tiltakinum.

Byrjað verður við, at boðið verður vælkomin, og síðan verður felagssangur, skemt og upplestur, har kvinuligur yrkjari, ættað úr Miðvági, lesur egnar yrkingar.

Fyrri partur av kvøldsetuni endar við, at kvinnuligi borgarstjórin í Sandavági fer at siga frá politiska arbeiði sínum, áðrenn eins steðgur verður, har til ber at fáa kaffi ella te saman við køkum frá vágakonum og sodavatni frá Restorffs, sum verður at fáa ókeypis.

Síðan verður framførsla av tveimum sangum, sum ein sandavágskona hevur gjørt og sjálv fer at syngja. Meira skemt verður í tveimum umførum eftir steðgin, og ein kvinnubólkur úr Vágum fer at spæla tónleik.

Kvøldið endar við felagssangi.

Meðan kvøldsetan er, er eisini listaframsýning, har tvær vágakonur fara at sýna fram málningar og seymaðar myndir, tær hava gjørt.



# Eina paragraff frá fullveldi

**Ein føroysk grundlóg skal innihalda eina áseting um, at føroyingar einsæris kunnu loysa frá Danmark. Sostatt staðfesta føroyingar sín sjálvsavgerðarrætt, um teir samtykkja grundlógina við eini fólkaatkvøðu. Tað var annars snávingarsteinurin í samráðingunum um fullveldi**

GRUNDLÓG
*Ingi Rasmussen*



*Tað er umráðandi at fáa fólkið við í tilgongdina til eina føroyska grundlóg, sigur Jóan Pauli Joensen, formaður í Grundlógarnevndini. Í næstu viku verður ferð sett á grundlógararbeiðið, tá ein ráðstevna verður hildin í Norðurlandahúsinum.*

*Mynd Jens K. Vang*

Ein føroysk grundlóg skal innihalda eina lógargrein, sum ger av, at føroyingar av sínum eintingum kunnu taka fullveldi uttan at spyrja donsku stjórnina eftir.

Tað siga bæði Jóan Pauli Joensen, formaður í Grundlógarnevndini, og Rúni Joensen, aðalstjóri í løgmálaráðnum.

Arbeitt verður í løtuni við at seta arbeiðið í grundlógarnevndini aftur á sporið. Í næstu viku verður ein stór altjóða ráðstevna í Norðurlandahúsinum, har serfrøðingar og áhugað í trígjar dagar fara at kjakast um eina komandi grundlóg fyri Føroyar.

Í løgtinginum verður í løtuni viðgjørt, hvussu tað praktiska arbeiðið í einari grundlógarnevnd skal skipast. Men greitt er, at tað fær eitt øðrvísi innihald, nú fullveldið ikki stendur ovast á politisku dagsskránni í Føroyum.

– Fullveldi er ongin fortreyt fyri, at vit fáa eina føroyska grundlóg. Tú kanst siga, at so leingi vit ikki hava fullveldi, so er talan um eina víðkaða stýrisskipanarlóg ella stjórnarlóg. Men mín persónliga meining er, at ein komandi grundlóg skal gerast soleiðis, at bert ein grein skal broytast, fyri at Føroyar fáa fullveldi, sigur Jóan Pauli Joensen, formaður í Grundlógarnevndini.

Orðið grundlóg er annars ongin treyt, sigur hann, tí evstalóg, stjórnarlóg ella stýrisskipan kunnu eins væl brúkast.

## Staðfesta sjálvsavgerð

Grundlógararbeiðið var upprunaliga ein partur av fullveldistilgongdini, og tí gekst striltið at fáa rættiligt glið á arbeiðið í grundlógarnevndini, ið varð mannað við politikarum og embætisfólkum. Politisku málini vóru rætt og slætt ov ymisk. Við at skipa tann spurningin í eina grein, har tað verður ásett, at Føroyar fáa fullveldi, um føroyingar ynskja tað, slepst helst undan, at spurningurin verður høvuðsevni á hvørjum einasta fundi.

Spurningurin um, hvørt føroyingar eru ein tjóð við sjálvsavgerðarrætti, var annars snávingarsteinurin, tá samráðingarnar millum donsku stjórnina og Føroya landsstýri slitnaðu 26. oktober 2000.

Danska stjórnin vildi ikki svara, um føroyingar sjálvir høvdu rættin at skipa seg sum sjálvstøðugt ríki við fullveldi, sigur Rúni Joensen, aðalstjóri í løgmálaráðnum, sum sjálvur var við til samráðingarnar. Men við at seta tað í eina grundlóg, sum føroyingar samtykkja á einari fólkaatkvøðu, slepst undan tí kjakinum.

– Tað kann gerast við, at ein grein í grundlógini ásetir, at sáttmálar við fremmand lond kunnu setast úr gildi við fólkaatkvøðu í Føroyum. Altso kann føroyska fólkið gera av, at heimastýrislógin verður tikin av. Sostatt samtykkir Føroya fólk, at føroyingar eru tjóð við sjálvsavgerðarrætti, sigur Rúni Joensen, og leggur afturat, at tað torir ongin stjórn at seta seg ímóti.

## Gongdin avgerandi

Fullveldismálið hevur í stóran mun forða fyri mennandi kjaki í gomlu nevndini, sigur Jóan Pauli Joensen.

– Fyrst var arbeiðið vent ímóti einum ítøkiligum úrsliti, har fullveldi var málið. Nú síggi eg, at prosessin er minst líka týdningarmikil. Vit skulu skapa eina mentan, har fólk fáa grundlógina í blóðið, sigur Jóan Pauli Joensen. Júst hetta, at fáa fólkið við sær, er avgerandi í grundlógartilgongdini. Tí varð skotið upp, at grundlógarráð vórðu sett á stovn við eitt val, har fólk kring alt landið vórðu vald. Ráðini kundu so skipa fyri vártingum sum í gomlum døgum, har fólkið kom til orðanna.

– Eg helt tankan um várting verða sjarmerandi, men tað vísir seg, at politiskur vilji er ikki at fremja tey. Men tað er umráðandi, at vit fáa fólkið við í tilgongdina, so hetta ikki kenst sum ein lóg, ið er smoygd oman yvir fólk, og tí mugu vit finna aðrar mátar, ið kanska verða meiri ad hoc-kendir, sigur Jóan Pauli Joensen.

Og Rúni Joensen skoytir uppí, at hetta er ongin vanlig lóg, og tí má hon fremjast øðrvísi.

– Fólk mugu føla, at tey eru við og hava møguleikan at ávirka lógina, tí tað eru nógv kontroversiell viðurskifti, sum skulu viðgerast í einari grundlóg, sigur Rúni Joensen. Kirkjan og rætturin til tilfeingið eru dømi um evni, sum verða ásett í einari grundlóg.

## Málið er 2005

Sambært uppskotinum til grundlógarnevnd fáa føroyingar egna grundlóg í 2005. Fyrst skal hon samtykkjast á fólkaatkvøðu, tí hetta er »eitt stig á leiðini«, sum Jóan Pauli Joensen sigur.

Nógvar freistir hava verið nevndar, og eitt nú varð upprunaliga ætlanin, at ein føroysk grundlóg skuldi setast í gildi longu í 2000. Men bæði Jóan Pauli Joensen og Rúni Joensen eru bjartskygdari við tíðarkarminum, nú ein grundlóg kann viðgerast á breiðari grundarlagi.

– Kunnu vit loysa sjálvstýrisknútin í einari grein, so kann arbeiðið ganga skjótari, og tí er meiri sannlíkt hesaferð, at freistin kann haldast, sigur Rúni Joensen.

# Stór altjóða ráðstevna

GRUNDLÓG
*Ingi Rasmussen*

Í døgunum frá 11. til 13. mars verður stór altjóða ráðstevna í Norðurlandahúsinum, sum Grundlógarnevndin skipar fyri. Ráðstevnan verður hildin samstundis, sum grundlógararbeiðið av álvara verður tikið uppaftur. Eftir ætlan fer løgtingið at samtykkja eina nýggja lóg um grundlógararbeiðið. Politisku flokkarnir fara síðan at velja síni umboð í nevndina, sum fer til verka við støði í arbeiðnum, sum varð gjørt í síðsta valskeiði og tí, sum skrivstovan hjá nevndini hevur fyrireikað.

Ráðstevnan fer at viðgera fleiri evni, sum hava týdning fyri grundlógararbeiðið. Millum annað grundlógartilgongd, samveldisstøðu og hvat ein stjórnarlóg skal brúkast til.

Evnini verða skipað við fyrilestrum og orðaskifti. Harumframt verða eisini verkstovur, har til ber at kjakast meiri óformliga um evnini.

Á ráðstevnuni verða fleiri gestir frá altjóða stovnum og lærdum stovnum. Fyrilestrarhaldararnir og verkstovurnar verða á føroyskum, umframt enskum og norðurlendskum máli. Umleið 150 fólk hava meldað seg til ráðstevnuna, sum Bárður Larsen, ið starvast á løgmálaráðnum, samskipar.

# Politiska støðan framvegis óviss

Hóast Tjóðveldisflokkurin fundaðist heilt til á midnátt hósdagin, so fekst ongin loysn á samgongutrætuni, ið er íkomin, síðan løgmaður segði Annlis Bjarkhamar úr starvi.

Helst gongur alt vikuskiftið, áðrenn Tjoðveldisflokkurin ger nakra niðurstøðu í málinum.

Umframt uppsøgnina av landsstýriskvinnuni, so viðger flokkurin eisini samstarvið í samgonguni í síni heild. Stevið hevur verið vánaligt, líka síðan samgongan varð skipað, og flokkurin umhugsar av álvara, um tað er vert at halda fram.

Enn er ongin nýggjur landsstýrismaður við mentamálum valdur, og til tað verður gjørt, umsitur Høgni Hoydal, varaløgmaður, eisini mentamál.

**-ir**

# Samband ynskist

Tíðin er komin til broyting.

Tað sigur Sambandsflokkurin í einum tíðindaskrivi, nú samgongan enn einaferð er í djúpari kreppu.

– Føroya fólk hevur uppiborið at fingið eina arbeiðsføra samgongu og politiskan stabilitet. Brúk er fyri persónum og flokkum, sum kunnu vísa á loysnir á landsins trupulleikum, sigur Sambandsflokkurin.

Loysnin eitur Sambandsflokkurin.

– Tíðin er komin er komin, at løgmaður, landsstýrið og samgongan taka valið 30. apríl til eftirtektar. Sambandsflokkurin er til reiðarat taka við landsins leiðslu við útgangsstøði í stevnuskrá, nýskipanaruppskoti og valskrá flokksins frá løgtingsvalinum.

**-ir**